VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

**Dagfesting:** 25.05.2021 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke

Varalimir:

Ikki til staðar: Jens Gaardlykke, Dagbjørn Hansen

Aðrir partar: Óli Joensen, grannskoðari

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 3/21 | 21/00105-8 | 5. Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| 4/21 | 21/00392-2 | Áheitan frá bygginevndini fyri heimið á Sýnini | 4 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 77/21 | 21/00375-2 | Støðutakan til roknskapin fyri 2020 | 5 |
| 78/21 | 21/00263-3 | Uppskot til kommunustýrisskipan 2021 | 6 |
| 79/21 | 20/00922-8 | Umsókn um projektbroyting til Loftagrund | 7 |
| 80/21 | 20/00965-2 | Umsókn at byggja altan, matr. nr. 12m í Miðvági | 8 |
| 81/21 | 20/01080-5 | Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr.nr. 12ap í Miðvági | 9 |
| 82/21 | 20/01100-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 122o í Sandavági | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 83/21 | 20/01172-4 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 198a í Sandavági | 11 |
| 84/21 | 21/00217-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvági, við frágreiðing | 12 |
| 85/21 | 21/00285-2 | Støðutakan til sundurbýti av matr. nr. 402g í Vatnsoyrum | 13 |
| 86/21 | 21/00270-3 | Støðutakan til umbýti millum matr. nr. 34a og 102a | 14 |
| 87/21 | 21/00272-2 | Støðutakan til umbýti millum matr. nr. 68 og 165a | 15 |
| 88/21 | 21/00140-3 | Marknaumskipan matr. nr. 122 í Miðvági | 16 |
| 89/21 | 21/00112-3 | Uppskot til útstykking omanfyri í Geilini í Vatnsoyrum | 17 |
| 90/21 | 21/00165-4 | Umsókn at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 169d í Miðvági | 18 |
| 91/21 | 21/00225-2 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina á matr.nr 208c og 99a í Miðvági | 19 |
| 92/21 | 21/00315-2 | umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 210g í Sandavági | 21 |
| 93/21 | 21/00319-2 | Umsókn um annað virksemi í Vakstrarhúsinum | 22 |
| 94/21 | 21/00329-1 | Endalig avseting av skráa í Grótbrotinum í Miðvági | 23 |
| 95/21 | 21/00340-2 | Luna P/F søkir um loyvi at takað høll R niður og byggja nýggja høll | 24 |
| 96/21 | 21/00154-3 | Umsókn frá Vága Útvarp um stuðul | 25 |
| 97/21 | 21/00239-2 | Umsókn um svimjing í Kvívík | 27 |
| 98/21 | 21/00290-3 | Uppsøgn av leigusáttmála | 28 |
| | | | |


Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 3/21 5. Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.05.2021 | 3/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 25. maj 2021:**

Formansváttan:

## 4/21 Áheitan frá bygginevndini fyri heimið á Sýnini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.05.2021 | 4/21 |

**Málslýsing:**

Bygginevndin fyri heimið á Sýnini hevur sent borgarstjórunum skriv viðv. 3. byggistig á Sýnini. Bygginevndin ynskir at Býráðið tekur støðu til um ætlanin er at fara í gongd við 3. byggistig. Hetta til kunningar.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

**77/21 Støðutakan til roknskapin fyri 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.05.2021 | 46/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 77/21 |

**Málslýsing:**

Roknskapurin fyri 2020, vísir eitt RLÚ uppá -1.229 mill.kr. (hall) og eina útjavningar-konto uppá -34.543 mill. kr.

Rakstrarútreiðslurnar eru 90.903 mill. kr., sum er 2.684 mill. kr. meira enn í 2019.
Løguútreiðslurnar eru 19.117 mill. kr. , sum er 5.096 mill. kr. meira enn í 2019.

**Viðmerkingar hjá umsitingini**

Mælt verður til at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 17. maj 2021:**

Mælt verður til at góðkenna roknskapin.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 78/21 Uppskot til kommunustýrisskipan 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 24/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 09.04.2021 | 12/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 36/21 |
| 4 Býráðið | 27.04.2021 | 74/21 |
| 5 Býráðið | 25.05.2021 | 78/21 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur arbeitt við eini nýggjari kommunustýrisskipan fyri Vága kommunu. Undanfarna býráð samtykti at gera broytingar í kommunustýrisskipanini í 2017, men varð sjálv kommunustýrisskipanin ongantíð formelt broytt. Við hesum uppskotinum er tann broytingin við, umframt at aðrar konsekvensbroytingar og dagføringar eru gjørdar.

**Vinnu- og havnanevndin 09. apríl 2021:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2021:**

Mæla til at taka undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini

**Býráðið 27. apríl 2021:**

Einmælt samtykt.

**Býráðið 25. mai 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 79/21 Umsókn um projektbroyting til Loftagrund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 37/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 79/21 |

**Málslýsing:**

SÍF fekk tann 16.09.2020 byggiloyvi til at um- og útbyggja Loftagrundina, matr.nr. 150d í Sandavági.

Nú hava tey sent inn nýggja umsókn, tí projektið er broytt.
Ætlanin er at lækka hæddarskilnaðin, so loftið verður ein nýtilig goymsla. Tí er neyðugt við rýmingarleið á loftinum, og tað verður loyst við eini dupultari glashurð og lítlari altan.

Altanin stingur útum matrikulin, og út yvir kommunalt øki, uml. 2,6m yvir jørð. Altanin er 830mm djúp og 2400mm breið.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Frámælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Rósa Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt at geva loyvi til at lækka hæddarskilnaðin. Tó verður ikki givið loyvi til altan.

Formansváttan:____________

## 80/21 Umsókn at byggja altan, matr. nr. 12m í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 38/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 80/21 |

**Málslýsing:**

Eigarnir av matr. nr. 12m í Miðvági, søkja um loyvi at byggja altan á norðursíðuni av húsunum.

Altanin er 3m breið og 10,2m long.

Sambært kortal.fo, so eru tað bert uml. 1,6m frá sethúsinum til mark móti Skaldavegi og kemur altanin tí 1,4 m út um mark.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Tekniski leiðarin mælir frá at geva byggiloyvi.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Frámælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Grunda á, at altanin fer útum mark og, at tað gongur út yvir ferðslutrygdina.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 81/21 Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr.nr. 12ap í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 28/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 81/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 12ap í Miðvági søkir byggiloyvi til bilhús.

Bilhúsið verður 320cm breitt, 800cm langt og 400cm høgt.
100cm frá vegnum og 140cm frá sethúsunum.

Sí viðheftu tekningar

**Viðmerking**
Sambært byggisamtyktini er hæddin á bilhúsinum hægri enn loyvt. Mett verður ikki, at bygningurin er til ampa fyri nakran.

Viðmælt at geva loyvi, treyta av at bæði veggur og tak í venda móti sethúsunum verða gjørd sum brandverjuveggur.

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Viðmælt, treyta av at fáa betri tekningar

**Býráðið 25. maj 2021:**

Málið verður beint aftur í teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 82/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 122o í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 40/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 82/21 |

**Málslýsing:**

Søkt verður um at býta innangarðsjørðina frá matr. nr. 122o í Sandavági. Ætlanin er at selja hana til Dalhagan, og leggja saman við matr. nr. 275b í Sandavági, ið hoyrir til hagapartin Dalhagi, matr. nr. 373b.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**
Jóanis Albert Nielsen luttók ikki í viðgerðini.

Viðmælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

# 83/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 198a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 41/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 83/21 |

**Málslýsing:**

Arvingarnir eftir Thomas Nielsen søkja um sundurbýti av matr. nr. 198a í Sandavági.

Ynski er at sundurbýta matrikulin í 4 partar. soleiðis at Sólva Nielsen eigur partin omanfyri vegin. Nr. 3 og 4, norðari partur niðanfyri vegin, verður deildur í 2, uml. 2350m2 hvør, og nr. 2, sunnari parturin niðanfyri vegin, uml. 4700m2.




Harumframt verða 2 gyllin á Steig (Gimbragonga) partur av ognarlutinum omanfyri vegin (nr.1).

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:__________

# 84/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvági, við frágreiðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 45/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 84/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevu sent Vága kommunu umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvagi til ummælis.

Talan er um at leggja aftur at matr. nr. 12d í Miðvági, sum er grundstykkið hjá Jógvan Hans Hansen og Haldis Hansen.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Parturin, ið ætlanin er at leggja aftur at matr.nr. 12d liggur í øki, sum liggur í eini framtíðar ætlan um útstykking. Um parturin verður lagdur aftur at matr. nr. 12d kemur hetta at verða í vegin fyri hesi møguligu framtíðar útstykking.

Eisini kann viðmerkjast, at aðrir eigarar í grannalagnum hava søkt kommununa um loyvi at keypa burtur av stykkinum omanfyri, men hava fingið noktandi svar av somu orsøk.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Frámælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**
Ásla Leila B. Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Frámælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 85/21 Støðutakan til sundurbýti av matr. nr. 402g í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 49/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 85/21 |

**Málslýsing:**

Jórun Lómstein søkir um sundurbýti av matr. nr. 402g í Vatnsoyrum.

Søkt verður um at sundurbýta matrikulin í trý stykkir. Stykki A 583m² og stykkini B og C uml. 500m² hvørt.

Ætlanin er at nýta stykkini til sethús. Á stykki C stendur eitt sethús.

Byggisamtyktin er júst broytt til B-øki fyri allan matr. nr. 402g.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 86/21 Støðutakan til umbýti millum matr. nr. 34a og 102a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 47/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 86/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um umbýti til ummælis hjá Vága kommunu.

Matr. nr. 34a í Sandavági letur 8 gyllin í Slættanesi til matr. nr. 102a í Sandavági.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 87/21 Støðutakan til umbýti millum matr. nr. 68 og 165a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 48/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 87/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um umbýti til ummælis hjá Vága kommunu.

Matr. nr. 68 letur uml. 1400m$^2$ til matr. nr. 165a í Sandavági.
Sami eigari er á báðum matriklum.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 88/21 Marknaumskipan matr. nr. 122 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 42/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 88/21 |

**Málslýsing:**

Vága kommuna hevur fyngi marknaumskipan til ummælis frá Umhvørvisstovuni.

Talan er um at flyta vegin, sum liggur eystanfyri matr. nr. 122 á vestaru síðu av matr. nr. 122, og tað sum var avlagt til veg, verður lagt afturat matr. nr. 122.Samstundis verður ein trýhyrningur, sum er 3 m frá niðara húsahorni og 2,70 m frá ovara húsahorni av matr. nr. 286, tikin burturav vegi (f) og lagdur afturat matr. nr. 286. Matr. nr. 122 fær umleið 2 fermetrar av vegi (f) í útnyringshorninum.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 89/21 Uppskot til útstykking omanfyri í Geilini í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 56/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2021 | 48/21 |
| 3 Býráðið | 25.05.2021 | 89/21 |

**Málslýsing:**

Borgarar hava víst áhuga fyri grundstykkjum í Vatnsoyrum, og tí hevur umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til útstykking. Ætlanin er, í fyrstu syftu at gera 3-4 grundstykkir omanfyri í Geilini.

Talan er um matr. nr. 410a og 411a, ið Føroya Jarðargrunnur eigur.

Vegur niðan ímillum matr. nr. 410d og 410c

Ein partur liggur í B-øki sethúsaøki

Sí viðløgdu skjølini.

Tekniski leiðarin metir at útstykkingin kann gerast fyri millum 2 og 2,5 mill. krónur

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Tekniska nevnd mælir til at gera klárt til tvey grundstykkir í fyrstu syftu.

**Fíggjarnevndin 17. maj 2021:**

Mælt verður til at taka undir við Teknisku nevnd.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:______________

## 90/21 Umsókn at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 169d í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 43/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 90/21 |

**Málslýsing:**

Eigarnir av matr. nr. 169d í Miðvági hava ætlanir at byggja bilhús/kjallara á matrikulin og hava fingið loyvi at keypa partar av matr. nr. 168 og 250b til endamálið.

Matriklarnir liggja í F-øki: Almenn frítíðarøki, og søkja tey um at fáa tað broytt til B-øki sethús, so tey kunnu fáa loyvi at byggja.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:___________

# 91/21 Umsókn um at broyta byggisamtyktina á matr.nr 208c og 99a í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.04.2021 | 32/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 69/21 |
| 3 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.05.2021 | 40/21 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 46/21 |
| 5 Býráðið | 25.05.2021 | 91/21 |

**Málslýsing:**

Vága kommuna hevur fingið eina áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri partar av matr.nr 208c og 99a í Miðvági

Øki verður sera nógv nýtt av børnum at skreiða á um veturin, rulla páskaregg og ymiskt annað. At nýta øki til sethús kann føra til ein stóran miss í trivnaðinum, ið hetta økið veitir í dag.



Partar av matriklunum eru í dag í øki B: sethúsaøki, *sí kortið*, og er ynski at broyta tað til øki F: Almenn frítíðarøki.

Formansváttan:____________

**Tekniska nevnd 09. april 2021:**

Taka ikki undir við at broyta byggisamtyktina

**Býráðið 27. april 2021:**

Samtykt at beina málið í mentunar- og trivnaðarnevndina.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. maj 2021:**

Mælt verður til at taka málið upp tá bygdarplanurin verður endurskoðaður.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Meirilutin tekur ikki undir við at broyta byggisamtyktina

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

# 92/21 umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 210g í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 50/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 92/21 |

## Málslýsing:

Eigarin av matr. nr. 210g í Sandavági søkir um at fáa broytt byggsamtyktina fyri grundstykkið til øki B: sethúsaøki.



Matrikulin liggur í dag uttanfyri byggisamtyktina.

## Tekniska nevnd 07. maj 2021:

Viðmælt.

## Býráðið 25. maj 2021:

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

# 93/21 Umsókn um annað virksemi í Vakstrarhúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 52/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 93/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av Vakstrarhúsinum í Sandavági søkir um loyvi at nýta húsið til annað endamál, enn tað hevur verði brúkt til.

Sunnara høllin oman móti landsvegnum verður brúkt til vakstrarhús, tað er Havin.fo sum húsast í høllini.

Húsið í miðjuni verður brúkt til veitslu- og samkomuhølir.

Í norðastu høllini er einki virksemi í løtuni, men ætlanin er at brúka høllina til handil, ella veitslu- og samkomuhøli.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Um loyvi verður givið til broytta nýtslu, eigur tað at verða við tí treyt, at parkeringsviðurskiftini verða fingin upp á pláss.

Tekniski leiðarin hevur sýnað hølini saman við brunaumsjónarmanninum, og eru hølini fyribils góðkend, við nøkrum krøvum um smærri broytingar.

Vakstrarhúsið liggur í byggisamtyktini í øki C-Vinnuendamál, men eigur byggisamtyktin at verða broytt til øki A-Miðstaðarendamál, so hon samsvarar við nýtsluna av Vakstrarhúsinum.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

Viðmælt at geva loyvi treytað av at parkeringsviðurskiftini verða fingin uppá pláss. Eisini verður viðmælt at broyta byggisamtyktina til øki A-Miðstaðarendamál.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at geva fyribils loyvi fram til 31. desember 2021. Harafturat er einmælt samtykt at broyta byggisamtyktina til øki A-Miðstaðarendamál..

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 94/21 Endalig avseting av skráa í Grótbrotinum í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 07.05.2021 | 13/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 94/21 |

**Málslýsing:**

Umsitingin hevur tekna uppskot til liðuggerð av skráanum í grótbrotinum í Miðvági.

Nevndin verður biðin at taka støðu til málið.

**Vinnu- og havnanevndin 07. maj 2021:**

Viðmælt at gera skráan 12 metur høgan.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Vinnu- og havnanevndini.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

# 95/21 Luna P/F søkir um loyvi at takað høll R niður og byggja nýggja høll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2021 | 53/21 |
| 2 Býráðið | 25.05.2021 | 95/21 |

**Málslýsing:**

Verandi høll R er 55,00 m long og 16,00 m breið, hæddin er 4,50 m.
Nýggja høllin ætlanin er at byggja verður 70-75,00 m long og 16,00 m breið, hæddin er ætlað at verða 4,50 m.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

1. Loyvi at takað verandi høll niður metir umsitingin ikki verða nakran trupuleika.
2. Byggiloyvi til nýggja høll eigur bert at verða givið við tí treyt, at fullfíggjað prosjekt fyriliggur.

Eisini eiga øll loyvi frá haga og friðingarmyndugleikum at fyriliggja.

**Tekniska nevnd 07. maj 2021:**

1. Loyvi verður givið
   Tekniska nevnd tekur undir við umsitingini.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 96/21 Umsókn frá Vága Útvarp um stuðul

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.03.2021 | 21/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 29/21 |
| 3 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 28/21 |
| 4 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.05.2021 | 39/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.05.2021 | 49/21 |
| 6 Býráðið | 25.05.2021 | 96/21 |

**Málslýsing:**

Vága útvarp søkir um stuðul til at gera lokalt útvarp í Vágum. Søkt verður Vága kommunu og Sørvágs kommunu um samanlagt kr. 5.000 um mánaðin.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. marts 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 18. marts 2021:**

Samtykt at koyra málið aftur í mentunar- og trivnaðarnevndina.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. apríl 2021:**

Samtykt at kalla umboð fyri Vága útvarp inn til næsta nevndarfund.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. maj 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 17. maj 2021:**

Mælt verður til at stuðla sendingunum saman við Sørvágs kommunu frá 1. juni til endan av 2021.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**<u>Býráðið 25. maj 2021:</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 97/21 Umsókn um svimjing í Kvívík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.04.2021 | 26/21 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.05.2021 | 44/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.05.2021 | 50/21 |
| 4 Býráðið | 25.05.2021 | 97/21 |

**Málslýsing:**

Skúlin á Giljanesi søkir um loyvi at leiga svimjihylin í Kvívík. Orsøkin er tann, at tað er ikki møguligt at leiga fleiri tímar í svimjihylinum í Sørvági.

Kostnaðarmeting:

Leiga svimjihøll í Kvívíkar skúla í 37 vikur/ár 81.400 kr. v/mvg.

Busskoyring við "Giljanes bussar" 185.000 kr. u/mvg.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. april 2021:**

Samtykt at heita á umsitingina at kannað málið nærri, til næsta nevndarfund.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. maj 2021:**

Mælt verður til at ganga umsóknini á møti, og taka hædd fyri tí í komandi fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 17. maj 2021:**

Mælt verður til at núverandi 6 flokkur heldur áfram at svimja frammeftir.
Um grundarlag er fyri tí verður mælt til at økja um svimjingina frammeftir.

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

## 98/21 Uppsøgn av leigusáttmála

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.04.2021 | 43/21 |
| 2 Býráðið | 27.04.2021 | 75/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.05.2021 | 59/21 |
| 4 Býráðið | 25.05.2021 | 98/21 |

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Býráðið 27. april 2021:**
Einmælt samtykt at viðgera málið fyri afturlatnum hurðum.

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

**Býráðið 25. maj 2021:**

Einmælt samtykt at viðgera málið fyri afturlatnum hurðum.

Formansváttan:____________

Fundurin lokin kl. 20:15

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan: